# Maru sagt 130 fólkum upp

**Hetta kemur ikki óvæntað á. Virkið hevur ligið stilt so leingi, og uppsagnirnar hava tí hingið í luftini, sigur Hergerð Joensen næstforkvinna í Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag**



*Kósavirkið hevur nú ligið stilt í meiri enn ein mánaða*

Tað hevur ligið í luftini í longri tíð, at arbeiðsfólkið á Kósini fór at fáa uppsagnarbræv, og nú komu tey so í morgun.

Men hetta er ikki nakað, sum kemur óvart á.

- Virkið hevur ligið stilt í meiri enn ein mánað nú, og fólk hava hingið í fiskavirkisskipanini hjá ALS. Tað ber jú heldur ikki til at halda fólki til virkið í ævigatíð, sigur Hergerð Joensen, næstforkvinna í Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag.

Hon sigur, at tað ávirkar býin í stóran mun, at virkið liggur stilt. Handlarnir í Klaksvík merkja væl, at fólk einki arbeiði hava.

Hergerð Joensen sigur, at nevndin í felagnum ikki hevur tosað nakað serligt um, hvørt felagið skal verða við í einari endurreisn av virkinum. Hon sigur, at stór skuld er í virkinum og felagið er ikki serliga peningasterkt. Og hetta hevði undir øllum umstøðum skula fyri ein eykaaðalfund.

- Men virkið er farið av knóranum fleiri ferðir fyrr, og er eltíð latið upp aftur, so man Klaksvíkin ikki eisini hesaferð fara at reisa seg, sigur Hergerð Joensen.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av útsynningi og fyrrapartin yvirhøvur turt, men seinnapartin ælingur, partvís vátakavi. Hitin millum 3 og 6 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av vestri, seinnapartin upp í hvassan vind av útsynningi. Ælingur, partvís kavi, men eisini sólglottar og hitin millum 2 og 5 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 3 og 6 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Leygardagin upp í hvassan vind av landsynningi og regn. Hitin um 6 stig. Sunnudagin upp í hvassan vind av útnyrðingi og ælingur, partvís kavi. Hitin niður móti frostmarkinum.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -8 |
| Nuuk | -9 |
| Qaqortoq | -7 |
| Ammassalik | -4 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 2 |
| Seyðisfjørður | 5 |
| Tórshavn | 6 |
| Lerwick | 3 |
| Aberdeen | 1 |
| London | 3 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | -1 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 2 |
| Keypmannah. | 1 |
| Helsinki | 1 |
| Moskva | -1 |
| Berlin | 1 |
| Warzawa | 6 |
| Kiev | 1 |
| Bukarest | 6 |
| Paris | 3 |
| Madrid | 8 |
| Róm | 12 |
| Malorca | 10 |
| Athen | 16 |
| Malta | 14 |
| Tunis | 11 |
| Beijing | 3 |
| New Dehli | 20 |
| Bangkok | 30 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | -- |
| New York | 4 |
| Miami | 26 |
| Los Angeles | 18 |
| Meksikobýur | 19 |
| Panama | 31 |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 25 |

## LUFTTRÝSTIÐ



**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 968 hPa. eystan fyri Hvarvið fer móti Íslandi.



**Í dag:**
Lágtrýstið eystan fyri Ísland fer í landnyrðing. Lágtrýstið í landsynning úr Hvarvinum fer í landnyrðing og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum mikudagin.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 11/12 kl. 06[00] – 12/12 06[00]. Hitin í gjár: 5,8°
Minsti hiti máldur í desember: -10,5° - Mesti hiti máldur í november: 2,4°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 5,0 mm – mált frá 11/12 kl. 06[00] – 12/12 06[00].
Avfallið higartil í desember: 46 mm

Alt um harmonikur



www.simme.eu




## VESTFALLSKYRRINDI

12. desember Fullmáni/ Mánin næstur jørðini
19. desember Seinna kvarter
26. desember Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 16. des | 9:36 | 22:01 | 8:36 | 21:01 | 8:51 | 21:16 | 11:36 | - | 0:09 | 12:36 | 7:51 | 20:16 | 6:51 | 19:16 | 9:51 | 22:16 | 10:51 | 23:16 | 9:21 | 21:46 | 10:36 | 23:01 |
| 17. des | 10:26 | 22:48 | 9:26 | 21:48 | 9:41 | 22:03 | 0:01 | 12:26 | 1:01 | 13:26 | 8:41 | 21:03 | 7:41 | 20:03 | 10:41 | 23:03 | 11:41 | - | 10:11 | 22:33 | 11:26 | 23:48 |
| 18. des | 11:11 | 23:47 | 10:11 | 22:47 | 10:26 | 23:02 | 0:48 | 13:11 | 1:48 | 14:11 | 9:26 | 22:02 | 8:26 | 21:02 | 11:26 | - | 0:03 | 12:26 | 10:56 | 23:32 | - | 12:11 |
| 19. des | - | 12:22 | 11:22 | 23:57 | 11:37 | - | 1:47 | 14:22 | 2:47 | 15:22 | 10:37 | 23:12 | 9:37 | 22:12 | 0:02 | 12:37 | 1:02 | 13:37 | - | 12:07 | 0:47 | 13:22 |
| 20. des | 0:57 | 13:32 | - | 12:32 | 0:12 | 12:47 | 2:57 | 15:32 | 3:57 | 16:32 | 11:47 | - | 10:47 | 23:07 | 1:12 | 13:47 | 2:12 | 14:47 | 0:42 | 13:17 | 1:57 | 14:32 |